## Berlusconi pílagrímur



Í Italia hevur Silvio Berlusconi, forsætisráðharri, boðað frá, at hann fer at taka lut í pílagrímsferðini Perdonanza Celestina, sum hevur verið í býnum l'Aquila tey seinastu 800 árini. Sambært tí gamla siðinum fáa luttakararnir fyrigeving fyri allar syndir, um teir játta seg sum syndarar og iðra seg um syndir sínar. Sambært blaðnum La Republica hava embætismenn hjá Berlusconi lagt trýst á Vatikanið, so forsætisráðharrin sleppur at sita undir liðini á skrivaranum hjá Vatikaninum við døgurðaborðið, sum verður aftan á sjálva pílagrímsferðina, ið verður fríggjadagin.

## Sólrun stillar upp

Á kommunuvalinum í Danmark í heyst fáa veljararnir í Gribskov kommunu á Sælandi møguleika at velja Sólrun Løkke Rasmussen, ið sum kunnugt er føroysk og kona Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharra. Hóast Sólrun er á sjeynda plássi á valevnislistanum hjá flokkinum Vinstra, væntar formaðurin í valfelagnum, at hon hevur góðar møguleikar at verða vald, tí sum er hevur Vinstra 14 av teimum 27 kommunustýrislimunum. Sólrun Løkke Rasmussen er ikki ókend í donskum kommunupolitikki. Hon hevur fyrr sitið tvey valskeið í Græsted-Gilleleje kommunu. Tann kommunan fór í søguna í teirri stóru kommunusamanleggingini fyri nøkrum árum síðani.

## Áttu at spurt Skrásetingina

Eik Grunnurin átti at tosað við Skráseting Føroya, áðrenn Spron-partabrøvini vórðu keypt frá Eik. Við at keypa partabrøv í Spron fyri 39,8 milliónir krónur, vildi Eik Grunnurin verja Eik Banka móti negativu umrøðuni, sum komu í kjalarvørrinum av amerikonskum bankakonkursum.

Íløgan er í dag mist hjá Eik-grunninum, og eftir áheitan frá tveimum dulnevndum persónum, gjørdi Skráseting Føroya av at kanna, um handiling var í samsvar við viðtøkurnar hjá Eik-grunninum.

Í niðurstøðu sínari staðfestir Skrásetingin, at talan var um somikið óvanligan handil, at grunnurin átti at biðið um loyvi til hetta frá Skráseting Føroya.

Við í kanningini var eisini keyp av partabrøvum í Investia og Sweden Properties, men Skrásetingin metir ikki, at hesir handlar kravdu samtykt, áðrenn teir vórðu gjøgnumførdir.

-mørk

# Ein løgin fiskur

**Stutt fyri middag í dag funnu brúkararnir á Virkni ein forvitnisligan fisk, tá tey vóru túr í Sandágerði. Talan var um ein 1,5 metur langan silvurkalva**

FISKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tá brúkararnir á Virkni vóru túr í Sandágerði í morgun, sóu tey eina heldur óvanliga sjón. Á veg niðan gjøgnum ánna var ein ovurlangur fiskur, ið tey ikki kendust við.

Menn hjá brandstøðini í Havn, sum vanliga koyra fólkini við MBF bussinum, fingu fatur á einum kavara hjá brandstøðini, sum kom oman og fangaði fiskin og fekk koyrt hann í eitt kar.

Fiskurin var enn livandi. Onkur, sum kom á staðið, helt seg kennast við henda fiskin, at tað var ein silvurkalvi. Fólk frá Havstovuni váttaðu, at talan er um ein silvurkalva. Hann er umleið hálvanannan metur langur.

Silvurkalvi er ikki heilt óvanligur undir Føroyum.



*Kári Sørensen av brandstøðini í Havn við silvurkalvanum, ið var mettur at verða umleið hálvanannan metur langur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Josef Motzfeldt nýggjur formaður í Útnorðurráðnum



*Josef Motzfeldt hevur tikið við sum formaður í Útnorðurráðnum eftir Kára P. Højgaard.*

**Útnorðurráðið hevur valt Josef Motzfeldt, formann í grønlendska Landstinginum, til nýggjan formann**

POLITIKKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Útnorðurráðið hevur valt Josef Motzfeldt, formann í grønlendska Landstinginum, til nýggjan formann. Hann varð valdur á ársfundinum hjá ráðnum, ið verður hildin 25. til 28. august í Runavík og í Havn. Josef tekur við eftir Kára P. Højgaard, løgtingslimi.

Josef Motzfeldt vísti í setanarrøðu síni, at øll trý útnorðurlondini luttaka fult út í norðurlendskum samstarvi, men at londini tó ikki eru heilt sum hini norðurlendsku londini, at tey hava nøkur serlig felags áhugamál, ið ikki neyðturviliga eru felags við restina av Norðurlondum. Hann víst tí á, at tað er júst tí at vit hava Útnorðurráðið.

- Útnorðursamstarvið snýr seg um at arbeiða fyri og verja felags áhugamál, bæði nationalt og internationalt, millum annað felags tilfeingi, søgu, mentan, sjóøki og umhvørvi, men at hesi eru undir støðugari hóttan, segði Josef Motzfeldt millum annað.

Josef Motzfeldt er valdur í grønlendska Landstingið fyri Inuit Ataqatigiit (IA). Hann hevur verið limur í Landstinginum síðani 1987 og hevur í fleiri valskeiðum verið landsstýrismaður í Grønlandi, eitt nú landsstýrismaður í Norðurlendskum samstarvi. Josef Motzfeldt er formaður fyri grønlendsku umboðini í Útnorðurráðnum. Hann hevur fleiri ferðir áður verið limur í Útnorðurráðnum.

Afturat Josef Motzfeldt, eru Ólína Þorvarðardóttir, Altingslimur, og Kári P. Højgaard, løgtingslimur, næstformenn í nýggja formansskapinum.